UTTAN ÚR HEIMI

## Søgulig vitjan

Forsetin í Serbia-Montenegro, Boris Tadic, kom sunnudagin á almenna vitjan í Kosovo. Hann er tann fyrsti serbiski ríkisleiðarin, sum vitjar Kosovo, síðani landsparturin kom undir ST-eftirlit í 1999.

Undan borgarakrígnum á Balkan búðu umleið 200.000 serbar í Kosovo, men í dag eru bara 80.000 eftir, tí teir flestu valdu at búseta seg í Serbia. Teir, sum valdu at verða búgvandi í Kosovo, liva undir einari støðugari hóttan frá tí albanska meiriluitanum, sjálvt um NATO-deildirnar hava lovað at verja teir ímóti ágangi.

Tá hann kom til Kosovo sunnudagin, segði Boris Tadic, at hann var komin hagar fyri at minna umheimin á viðurskiftini hjá tí serbiska minnilutanum. Hann gjødi samstundis greitt, at Kosovo er ein partur av Serbia-Montenegro, ikki bara sambært serbiskum lógum, men eisini sambært altjóða fólkarættinum.

## Mugu leggja uppí

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, vil hava NATO og ES at leggja uppí fyri at fáa enda á áganginum ímóti sivilfólkinum í sudanska landspartinum Darfur.

– Fólk doyggja hvønn einasta dag, tí vit megna ikki at verja tey, og tey hava tørv á verju alt fyri eitt. NATO og ES eru før fyri at taka neyðug stig, og tey eiga tí at umhugsa støðuna, segði Kofi Annan í røðu síni á einari trygdarráðstevnu í Múnchen sunnudagin.

Afrikanski Eindarfelagsskapurin hevur 1.850 friðarvarðveitandi hermenn í Darfur, og Kofi Annan segði, at teir gera eitt stórt arbeiði. Men teir megna ikki at loysa uppgávuna, og tí mugu felagskapir sum ES og NATO hjálpa teimum, segði hann. Kofi Annan legði afturat, at fólk í tíggjutúsundatali hava latið lív í ófriðinum í Darfur, og at 1,6 millión fólk eru rikin frá húsi og heimi.



## Pávin eigur at fara frá

Fyrrverandi brasilski erkabiskuppurin Cardinal Paulo Evaristo Arns heldur, at Jóhannes Páll pávi eigur at leggja frá sær.

Fyrrverandi erkabiskuppurin vísir á, at pávin hevur verið heilsuveikur í mong ár. Í seinastuni er hann viknaður uppaftur meiri, og tí er tíðin nú komin til, at hann eigur at fara frá, sigur Cardinal Paulo Evaristo Arns við tíðindastovuna AP.

– Eg haldi, at hann eigur at fara frá, men ivaleyst ætlar hann sær at verða sitandi, til eftirmaðurin er funnin, sigur fyrrverandi erkabiskuppurin í Sao Paulo.

## Tann seinasta deyð

Í 1917 vildu tríggjar portugisiskar smágentur vera við, at Maria moy hevði víst seg fyri teimum eina ferð um mánaðin tað árið, og at hon hevði sagt teimum, hvat fór at henda í framtíðini.

Nú er tann seinasta av teimum trimum deyð. Tað var nunnan Lucia Marto, sum doyði sunnudagin. Hon var 97 ára gomul. Sum smágenta vaks hon upp í bygdini Fatima, og í 1917 vildu hon og tvey systkinabørn hennara, tvíburðarnir Jacinta og Francisco, vera við, at tey høvdu sæð Mariu moy tann 13. í hvørjum mánað tað árið, og at hon hevði sagt teimum, hvat fór at henda.

Portugisiski forsætisráðharrin, Pedro Santana Lopez, segði sunnudagin, at deyðsboðini av Lucia Marto vóru eini sera kensluborin tíðindi.

# Háhús oyðilagt av eldi



*15 av teimum 32 hæddunum í háhúsinum eru oyðilagdar av eldinum*
*Mynd: Reuters*

**Vandi var fyri, at tað 110 metrar høga Windsor-háhúsið í Madrid fór at rapa, tá eldur kom í tað á midnátt leygarkvøldið**

ELDUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sunnumorgunin lá eitt tjúkt roykskýggj uppi yvir spanska høvuðsstaðnum Madrid, eftir at stór sløkkilið alla náttina høvdu roynt at fáa tamarhald á eldinum í tí 110 metrar høga háhúsinum.

Myndugleikarnir bóru ótta fyri, at húsini fóru at rapa, tí eldurin var so ógvusligur. Tí varð øll ferðsla steðgað, og fólk, sum búðu nærhendis háhúsinum, fingu boð um at fara haðani.

Myndugleikarnir siga, at eldurin kyknaði á 21. hædd, og at minst 15 av teimum 32 hæddunum eru fullkomiliga oyðilagdar av eldinum, sum sambært borgarstjóranum er tann størsti, sum nakrantíð hevur verið í býnum.

Windsor-háhúsið hýsti nógvum skrivstovum, men eingin var til arbeiðis, tá eldurin kyknaði, tí bygningurin hevur verið til umvælingar í seinastuni. Myndugleikarnir halda, at eldurin stóðst av einum skammlopi.

# Árið í ár verður tað heitasta

**Amerikanska rúmdarumsitingin, NASA, roknar við, at árið í ár verður tað heitasta í meiri enn hundrað ár**

VEÐURLAG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

1998 var tað heitasta árið á Jørðini í meiri enn hundrað ár, og 2002 og 2003 vóru næstan líka heit. Í fjør var meðalhitin á Jørðini 14 stig, og tað var hálvtannað stig oman fyri meðalhitan miðskeiðis í farnu øld, og 2004 var tískil tað fjórðiheitasta árið síðani endan á 19. øld, sigur NASA.

Men árið í ár verður tað heitasta, siga amerikonsku serfrøðingarnir. Orsøkin er økt dálking frá eitt nú bilum og stórídnaði, samstundis kyrrahavsfyribrigdið El Nino verður veikt í ár.

James Hansen hjá NASA sigur við Reuter, at ein onnur orsøk til tann veksandi hitan er, at Jørðin tekur meiri orku frá sólini til sín nú enn fyrr, og tí verður ein minni partur av sólarorkuni sendur út aftur í rúmdina. Tað saman við einum veikum El Nino ger, at 2005 verður heitari enn tey bæði seinastu árini og kanska eisini heitari enn metárið 1998, sigur James Hansen.

# Statoil metgott úrslit

Almenna norska oljufelagið hevði eitt sera gott ár í fjør.

Tað var ikki minst tí góða oljuprísinum fyri at takka, at Statoil hevði meiri enn 70 milliardir norskar krónur í avlopi í fjør fyri skatt. Til sammetingar kann nevnast, at avlopið í 2003 var 44 milliardir norskar krónur fyri skatt.

Rakstrarinntøkurnar í fjør vóru 306 milliardir norskar krónur.